

- Eg og aðrir útlendingar á føroyska mentanarpallinum eru livandi dømi um, at føroysk mentan er eitt klútateppi av impulsum frá øllum heraðshornum. Og soleiðis skal tað vera, sigur Ole Wich

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

ávísir bólkar eru afturhaldssinnaðir, tí hesi londini hava ein so stóran eyka intellektuellan kapasitet at ráða yvir. Men eitt mikrosamfelag sum tað føroyska hevur ikki ráð til at missa nakran, sigur Ole Wich.

### Trongskygdur mentanarpolitikkur

Eg siti við eini kenslu av, at okkara samtala er rættiliga teoretisk. At Ole Wich ikki heilt pointerar, júst hvar hendan útihýsandi nationalisman vísir seg í tí praktiska veruleikanum.

– Tilvitað ella ótilvitað gjøgnumsúrgar hon alt samfelagið sum sjógvurin rundanum fiskin. T.d. politisku flokkarnar, undirvísingarverkið og føroyska mentanarlívið. Í mentanarlívinum tykist tað serføroyska – hvat tað so enn er – at hava hægri tign enn tað, sum kemur uttanífrá. Tað merkir m.a.,

> Hevur man ikki so frægt álit á sínum egna, at man noyðist at byrgja seg inni við avoldaðum tjóðskaparligum hugmyndum?

at útlendingar skulu arbeiða harðari og longri, áðrenn teir fáa viðurkenning og sleppa uppí part, sigur Ole Wich.

Sjálvur hevur hann skírt føroyska myndlist fyri at vera nalvaskoðandi, stirvna, provinsiella og ókritiska. Seinast í sambandi við listaframsýningina "Natúrligvís" í Norðurlandahúsinum. Ein listaframsýning um náttúruna, sum Ole Wich ikki var partur av. Í staðin fyri at framleiða samfelagsrevsandi list, sum bjóðar av og flytur mørk, og í staðin fyri at problematisera okkara uppfatan av náttúruni, so skrivaði Ole Wich í eini kronikk í Dimmalætting, at føroysk myndlist er vónleyst forelskað í føroysku náttúruni og kann ikki brúkast til annað enn fitt prýði heima í stovunum.

Eitt annað dømi er samgonguskjalið hjá CHE samgonguni, sum aftur fekk Ole Wich at tríva í pennin fyrst í 2008. Orðingin um, at serstaki tjóðarsamleikin er undir trýsti uttaneftir og tí má stimbrast, er sambært Ole Wich eitt klokkuklárt dømi um ein tjóðskap við minnilutakompleksum, sum tí hevur fyri neyðini at útihýsa eksternum elementum:

"Det er meget foruroligende at se regeringspartierne bruge begrebet "tjóðarsamleiki" som overordnet ramme for deres fælles kulturpolitik. Enhver med lidt omtanke i hovedet kan se at begrebet "national identitet" er et udflydende gummibegreb, der ikke kan anvendes i praksis med fornuft. Færøsk kultur er et stort kludetæppe syet sammen af mange forskellige kulturer. Begrebet "tjóðarsamleiki" kan kun bruges til at udelukke folk fra det færøske samfund, og hvad skal vi med det? En "rigtig" færing findes ikke. Der er mange måder at være færing på", skrivaði Ole Wich í februar 2008, samstundis sum hann ramsaði upp eini 25 útlendingar, sum hava verið virknir á føroyska mentanarpallinum í mong ár. Frá Kristian Blak, Bernhard Wilkinson og Philippe Carré til Gianfranco Contri, Kate Sanderson og Kirsten Brix. Tí finst eingin autentiskur, serføroyskur samleiki, sum samgonguskjalið legði upp til.

Danski listamaðurin heldur, at nationalistarnir nýta orðið "tjóðarsamleiki" á sama hátt sum kristna fundamentalisman nýtir hugtakið "kristin virði". Í báðum førum er talan um eitt amboð, sum hevur til endamáls at sortera tað góða og uppbyggjandi frá tí ónda og niðurbrótandi. Og hann metir, at tann nationalistiska fundamentalisman er eins álvarsom og tann religiøsa.

Á internetsíðuni kjak.org hevur Ole Wich kjakast við formannin í Tjóðveldi um hesa atfinning. Og Høgni Hoydal metir ikki, at kritikkurin hjá Ole Wich er rættvísur.

– Tað er beinleiðis søgufalsan at leggja tjóðskaparrørsluna undir at byrgja Føroyar inni mótvegis umheiminum. Tvørturímóti hevur sjálvstýrisstríðið verið ein drívmegi í moderniseringini av Føroyum á øllum hermótum, ikki minst á mentanarpolitiska økinum, sigur Høgni Hoydal.

Ole Wich undirstrikar, at hann sum so ikki er úti eftir Tjóðveldi sum flokki. Og sambært honum hevur Tjóðveldi gingið á odda í summum spurningum, t.d. spurninginum um tey samkyndu. Men hann tvíheldur um, at Tjóðveldi eisini er ein eksponentur fyri eini latentari nationalismu, sum er ein so inngrógvin partur av tí andliga infrakervinum í landinum, at føroyingar ikki geva sær far um hana.

– Tað er fullkomiliga láturligt, at eitt land í 21. øld nýtir hugtakið "tjóðarsamleiki" sum ein karm um førda mentanarpolitikkin. Er føroysk mentan ikki nóg sterk til at súgva til sín alt tað, sum kemur uttanífrá? Hevur man ikki so frægt álit á sínum egna, at man noyðist at byrgja seg inni við avoldaðum tjóðskaparligum hugmyndum?, spyr Ole Wich, sum metir, at føroyskir tónleikarar hava gingið undan.

– Tónleikararnir hava sæð útheimin í eyguni í mong ár, mált seg sjálvar eftir honum og eru síðani farnir út í verðina. Hetta dirvið áttu politikararnir og onnur listafólk at lært nakað av, heldur Ole Wich.

### Viðurkenningin

Maðurin hevur búð í Føroyum síðani 1980, undantikið tíðarskeiðið frá 1996 til 2002, tá familjan búði í Aalborg, tí konan fór at útbúgva seg sum musikkterapeut á Aalborg Universitet.

Hann hevur verið virkin á føroyska listapallinum í yvir 20 ár. Men hann metir ikki, at hansara list er komin til sín rætt í listarliga umhvørvinum í Føroyum. Fyrst og fremst tí hansara list ikki hevur hóskað inn í hugaheimin hjá parnassinum.

Men ber Ole Wich seg ikki at sum eitt sjálvútvalt offur, tá hann í ramasta álvara pástendur, at hansara nationali uppruni er ein orsøk til, at hann ikki hevur sitið til háborðs í listarliga umhvørvinum í Føroyum?

– Eg eri alt annað enn eitt offur. Men summi uppfatað meg sum eitt sjálvútvalt offur, tí eg tori at rópa upp, tá eg haldi, at okkurt skal sigast. M.a. tá eg ákæri føroyskan mentunarpolitikk og føroyska list fyri at køvast í trongskygdum tjóðskapi. Men at bera

> Eg eri alt annað enn eitt offur. Men summi uppfatað meg sum eitt sjálvútvalt offur, tí eg tori at rópa upp

síni sjónarmið fram á torg merkir altso ikki, at man er beiskur ella fornermaður, undirstrikar hann. Offurleikluturin fær júst mótspæl, tá man torir at kjakast og brúka teir møguleikar, man hevur.

Upplivingin hjá Ole Wich av frástøðuni millum siðbundna, føroyska list og hansara egnu list kann í ein mun finnast aftur í bókini "Levende kunst" hjá listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen frá 2008. Í bókini fær Ole Wich hetta skoðsmálið: "Ole Wich har gennem en årrække ikke bare markeret sig som kunst- og kulturdebattør, tegner, fotograf og grafiker, men også som skaber af mere utraditionelle kunstformer, som web art, sms-poesi, happenings, performances, installationskunst og konceptkunst. Kunstformer, som vi i øvrigt ser meget lidt til i den færøske samtidskunst, der overvejende er – mere eller mindre – bundet til traditionelle udtryksformer".

Bingo!, hugsaði Ole Wich, tá hann læs orðini.

– Eg eri ein danskt talandi føroyingur av danskari ætt. Eg eri føroyingur, tí eg eri nærverandi í føroyska samfelagnum. At kritisera samfelagið fyri at hækka um støðið er ein ábyrgd, vit øll hava. Tí komi eg við mínum ískoyti, eins og so nógvir aðrir útlendingar her á landi. Vit eru livandi dømi um, at føroysk mentan er ein bráðpanna av impulsum frá øllum heraðshornum. Og soleiðis skal tað eisini vera, endar Ole Wich.